# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



**Býráðsfundur mánadagin 27. februar 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **17/00052**<br>**Broyting í byggisamtyktini, øki til koblingsstøð hjá SEV innan Eið**<br>Økið til koblingsstøð skal frábýtast og staðsetast í byggisamtyktini.<br><br>Umsitingin mælir til at økið til koblingsstøðina hjá SEV verður frábýtt og staðsett í byggisamtyktini.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at koblingsstøðin hjá SEV innan Eið verður staðsett í byggisamtyktini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndin. |
| 2. | **16/00438**<br>**Umsókn um sundurbýti av seyðahúsi á matr. nr. 65a til Ytrulíð**<br>Málið var fyri á fundi í byggi- og býarskipanar-nevndini tann 23. januar 2017 og verður tikið fyri nevnd av nýggjum.<br><br>Umsitingin mælir til at eigari/festari av ognini sendir umsókn um byggiloyvi til brunaskilavegg í seyðahúsinum. Tá ið skilaveggurin sambært umsókn er gjørdur, verður málið um sundurbýtið avgreitt.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til sambært grein 17 stk. 2 pkt. c at geva frávik, ella undantaksloyvi sambært hesi grein. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndin. |
| 3. | **17/00006**<br>**Rakstrarætlan fyri 2017 hjá Kongshavnar havn**<br>Kongshavnar havnarstýrið biður býráðið at góðkenna rakstrarætlanina fyri 2017.<br><br>Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini og mælir til at góðkenna rakstrarætlanina.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna | Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi rakstrarætlan. |

**Býráðsfundur mánadagin 27. februar 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

rækstraræltlanina.

**4. 17/00053**

**Umsókn um stuðul til háskúlauppihald**

Kommunan hevur móttikið umsókn frá einstaklingi um stuðul at fara á háskúla.

Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum huðrum*

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**5. 17/00058**

**Umsókn um stuðul – Tónleikasamtakið Grót**

Umsókn frá Tónleikasamtakinum Grót um fíggjarligan stuðul á 80.000,00 kr.

Umsitingin mælir til at veita stuðul.

Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini og mælir til at veita stuðul á 50.000,00 kr. Peningurin verður tikin av konto 5.24.14.510.10 - Stuðul til Mentan.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**6. 17/00062**

**Umsókn um stuðul til stovnan av kappróðrarfelagi í Eysturkommunu**

Umsókn um stuðul á 100.000,00 kr. frá kappróðrafelag undir stovnan.

Umsitingin vísir á hvat onnur ítróttarfeløg í Eysturkommunu fáa í stuðul.

Mentanarnevndin tekur undir við umsitngini og samtykkir veita stuðul á 20.000,00 kr. Stuðulin er treytaðir av at Eysturkommuna fær nærri lýsing av virkseminum. Peningurin verður tikin av konto 5.24.14.510.10-Stuðul til Mentan

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini, men mælir eisini til at geva tilsøgn um eina hægri upphædd, tá felagið er stovnað og áðrenn nýggjir bátar

Einmælt samtykt at veita stuðul á 80.000,00 kr. til keyp av útgerð.

*Gudny Langgaard av úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**Býráðsfundur mánadagin 27. februar 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**
verða bílagdir

**7. 17/00071**

**Umsókn um stuðul – Eldrafelagið Fjallið**
Umsókn um stuðul frá Eldrafelagnum Fjallið.

Umsitingin mælir til at veita stuðul

Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitngini og mælir til at veita stuðul á 35.000,00 kr. Peningurin verður tikin av konto5.24.14.510.10 - Stuðul til Mentan.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanrnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**8. 17/00079**

**Umsókn um stuðul – Losjan Glotti**
Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul á 40.000,00 kr. Peningurin verður tikin av konto 5.24.14.510.10 - Stuðul til Mentan.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanrnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**9. 17/00070**

**Tilbúgvingarstøð á Toftanesi í Leirvík, matr. nr. 169**
Prosjektið “ Tilbúgvingarstøð á Toftanesi “ verður lagt fram til góðkenning.

Umsitingin mælir til at útbjóðingartilfar verður gjørt út frá tekningum og arbeiðið verður bjóða út sum høvuðsarbeiðstøka.

Byggi- og býarskipanarnevndin hevur á fundi samtykt at gera rætting í lonini/partinum har kvistar eru, til at byggja eina lon afturat til skulastovu v.m.

Fíggjarnevndin mælir til at málið verður viðgjørt í býráðnum.

Einmælt samtykt at taka undir tilmælinum hjá umsitingini og byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 27. februar 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

**10.** **16/00310**

**Umsókn um keyp av lendi matr. nr. 120 í Leirvík**

Í sambandi við at eigari av matr. nr. 24 í Leirvík ynskir at keypa 183 $m^2$ av matr. nr. 120 hjá Landsverki, er jørðin sett til sølu. Landsverk hevur krøv til bygging fram við landsvegnum og í hesum førðum er hoyring eisini send til Søvn Landsins og góðkent.

Landsverk ynskir góðkenning frá kommununi, áðrenn selt verður.

Umsitingin mælir til at fylgja krøvum frá Landsverki og at góðkenna sølu av jørðini undir hesum treytum.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja krøvinum og treytum frá Landsverki.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevdini og fíggjarnevndini.

*Árni Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**11.** **17/00106**

**Innbúgv til býráðshúsið.**

Støðutakan til keyp av innbúgvi til býráðshúsið.

Einmælt samtykt at keypa innbúgv sambært fyriliggjandi notati og tilmæli.

**12.** **13/00010**

**Framtíðar framhaldsdeild í Eysturkommunu**

Støðutakan til uppskot frá stýrisbólkinum dagfest tann 20. juni 2016 til felags skjal viðvíkjnadi samstarvi um framhaldsdeild í Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu.

Samtykt at taka undir við uppskotinum frá stýrisbólkinum.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Árni Jacobsen, Gudny Langgard, Hans Mourits Foldbo, Uni Rasmussen, Hanna Jensen, Tollakur Joensen.

**Atkvøddi blankt:**
Hjalti Dalheim og Brandur Jacobsen.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________________________

**Býráðsfundur mánadagin 27. februar 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

Árni Jacobsen ______________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Gudny Langgaard ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________

Uni Rasmussen ______________________________